# Arbeiðseftirlitið
## søkir løgfrøðing



Okkara løgfrøðingur hevur tikið við nýggjum avbjóðingum og tí er eitt áhugavert starv sum løgfrøðingur á Arbeiðseftirlitinum leyst at søkja.

Høvuðsarbeiðsøki er at gera uppskot til lógir, kunngerðir, leiðreglur v.m., at ráðgeva stjóranum og starvsfólkum á stovninum. Harafturat kemur málsviðgerð og samskifti við virki, borgarar og myndugleikar í málum, sum hava samband við tað virksemið, sum Arbeiðseftirlitið umsitur. Eisini umfatar starvið undirvísing og kunning fyri virkjum og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Starvið, sum Arbeiðseftirlitið bjóðar, er í einum spennandi og góðum arbeiðsumhvørvi, har trygd, heilsa og trivnaður er umráðandi, og við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær møguleika fyri fakligari og persónligari menning. Samstarvað verður við Vinnumálaráðið.

### Setanartreytir

Vit ynskja, at umsøkjarin hevur løgfrøðiligt embætisprógv og helst royndir innan almenna fyrisiting. Somuleiðis er neyðugt at hava teldukunnleika á brúkarastøði, at skriva rætt føroyskt á ein lættskiljandi hátt og annars at duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár við møguleika fyri leingjan, um løgfrøðingurin í farloyvi ikki kemur aftur. Miðað verður eftir, at seta starvið skjótast til ber og er starvið lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

### Meira fæst at vita

um starvið við at venda sær til Karl Joensen, stjóra á tlf. 357811 ella um Arbeiðseftirlitið á heimasíðu www.arb.fo.

### Umsókn

saman við prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til Arbeiðseftirlitið, Falkavegur 6, 100 Tórshavn og vera stovninum í hendi í seinasta lagi
**24. januar 2007.**

Arbeiðseftirlitið | Falkavegur 6 - 100 Tórshavn
tlf. 35 78 11 - fax. 35 78 10 - www.arb.fo

## Skopunar Kommuna



# Námsfrøðingur
## til Barnagarðin í Gerðinum

Søkt verður eftir einum námsfrøðingi til **»Barnagarðin í Gerðinum«** at byrja 15.02.2007 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er í Skúlastovuni. Á stovuni eru 15 børn í aldrinum 6 – 8 ár.

**Um okkum:**
Barnagarðurin hevur barnagarðs- og vøggustovu og frítíðarskúla við børnum frá 1. og 2. flokki.

**Vit bjóða:**
Eitt áhugavert starv í einum umhvørvið tætt at náttúruni, frítíðarøkið og fótbóltsvølli.

**Vit vænta:**
At tú hevur umsorgan og virðing fyri børnunum. Hevur áhugað fyri barnavirksemi bæði innandura og uttandura. Hevur góð samstarvsevnir og er fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Um námsfrøðingur ikki søkjur um starvið, verður hjálparfólk fyribils sett.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Fríðu Eystberg Johannesen, leiðara tlf. 361202 ella fartlf. 216202.

Skrivlig umsókn við prógvi og viðmælum, skal sendast til:

**Skopunar Kommuna**
**Att:Fríða Eystberg Johannesen, leiðari**
**FO-240 Skopun**

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24.01.2007.

Setanarsamrøða verður í viku 04.


**RUKO LÁSATÆNASTA**

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20



**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA



Vit selja nýggjar bátar í ymiskum støddum og sløgum m.a. hesar



**OCQUETEAU 695**
(6,92 x 2,65)
v/Volvo 3D 130 hk (20 míl)
nakað av útgerð fylgjur við.
**523.000,-**
lev. í Føroyum



**JEANNEAU 625**
(6,40 x 2,55)
v/115 hk. Suzuki (30 míl)
**prísur frá 279.000,-**
lev. í Føroyum

RING OG AVTALAÐ ROYNDARTÚR

**HP.MARINE · SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 449191/219450 · hpe@kallnet.fo